

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 12 - 2012

# Oljufeløgini gera stórar íløgur í varandi orku

Varandi orka og serstakliga orka frá vindmyllulundum ymsa staðni í heiminum vindur nógv uppá seg. Ikki minst í okkara grannalondum, eitt nú Onglandi. Og millum íleggjararnar innan hesa alternativu orku eru eisini mong av heimsins stóru oljufeløgum m.a. norska Statoil. Í heyst vóru norski krúnprinsurin, norski oljumálaráðharrin saman við stjórunum í ávikavist Statoil og Statkraft til hátíðarhald í Sheringham í Onglandi, tá vindmyllulundin, ið er úti á havinum uttan fyri Sheringham, varð tikin í nýtslu. Hendan vindmyllulundin skal veita orku til tað, sum svarar til 1,3 ferðir føroysku orkunýtsluna. Føroyskur oljustjóri við Á ráðstevnu við greinarar og íleggjarar í Oslo í síðstu viku vísti føroyski oljustjórin í Statoil, Rúni M. Hansen á, at Statoil er við í nógvum stórum verkætlanum runt um í heiminum, eisini innan varandi orku. Ein av verkætlanunum innan varandi orku er vindmyllulundin uttan fyri Sheringham í Onglandi. Hetta er ein vindmyllulund, sum Statoil og Statkraft hava bygt í felag. Vindmyllulundin, sum fevnir um eitt øki uppá 35 ferkilometrar, er úti til havs umleið 17 til 23 km úr landi. Hon fevnir um ikki færri enn 88 vindmyllur, ið framleiða 3,6 MW hvør og tilsamans 317 MW ella tað, sum svarar til streym til 220.000 húsarhald í Onglandi. Samlaða íløgan í havvindmyllulundina er 10 mia. norskar kr. Arbeiðið byrjaði í 2009 og hava umleið 100 mans arbeitt við verkætlanini. Nú hon er liðug fara umleið 60 fólk at verða knýtt at framleiðsluni. Áhugaverd samanbering við Føroyar Áhugavert er at samanbera, hvat hendan vindmyllulundin klárar at framleiða í mun til samlaða føroyska orkutørvin. Tølini siga, at Sheringham Shoal, sum lundin verður kallað, klárar at forsýna Føroyar 1,3 ferðir við orku, tá vit rokna samlaða føroyska elframleiðslu, har upphiting av sethúsum og bygningum er íroknað. Her er orkunýtslan til flutningsfør og skip tó ikki tikin við. Eins og nógv onnur feløg og stovnar, hevur Statoil eisini gjørt sær ymiskar metingar

um framtíðar orkutørvin. Statoil væntar, at samlaða orkunýtslan í heiminum fer at vaksa við 40 prosentum fram til 2040. Mett verður, at fossila orkan fer frá at umfata 81 prosent av samlaðu orkunýtsluni í 2010 niður á 73 prosent av samlaðu orkunýtsluni í 2040. So sjálvt um nógv verður gjørt við at stimbra varandi orku, fara olja og gass framvegis at vera ein týdningarmikil partur av orkusamansetingini í heiminum í nógv ár framyvir. Stuðla eisini í Føroyum Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil sigur við Oljan.fo, at tað er at fegnast um, at bæði føroyskir myndugleikar og vinnulív eru farnir at raðfesta varandi orkuna meira. Føroyski oljustjórin vísir á, at Statoil telist millum tey mongu oljufeløgini í heiminum í dag, sum ger íløgur í bæði gransking og verkætlanir við varandi orku. Felagið hevur eisini stuðlað hesi menningini í Føroyum. Keldur -  http - //www.scira.co.uk/search/sitemap.php www.statoil.com www.statkraft.com Myndir -  Frá arbeiðinum at seta upp vindmyllulund til havs út fyri Sheringham í Onglandi. Norski krúnprinsurin og stjórin í Statoil til hátíðarhaldið í Sheringham, tá vindmyllulundin varð tikin í brúk Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil greiddi í farnu viku greinarum og íleggjarum á ráðstevnu um varandi orku frá arbeiðinum hjá Statoil á hesum øki.